# Kunngerð

## Broyting í býarskipanini fyri Eysturkommunu.

Við heimild í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipan og byggisamtykt, seinast broytt við Løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, verður við hesum uppskot til broyting í almennu byggisamtykini fyri Eysturkommunu framlagt til alment eftirlit.

Eysturkommunu býráð samtykti á fundi 15. desember 2022 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Eysturkommunu fyri part av matr. 426c umframt part av matriklunum 399, 400, 401, 402, 403, 404, 405 og 406 í Leirvík.

Uppskotið til broytingina snýr seg um at broyta part av matr. 426c, umframt part av matriklunum 399, 400, 401, 402, 403, 404, 405 og 406 í Leirvík, frá J-øki, Landbúnaðarøki, til B1-øki, Alternativ íbúðarbygging.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina á omanfyri nevndu matriklum í Leirvík, liggur frammi á [www.eystur.fo](http://www.eystur.fo) og á móttøkuni í býráðshúsinum í Norðragøtu, frá 30. januar 2023 og til og við 23. februar 2023.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 16. mars 2023.







Eysturkommuna
26. januar 2023